

Nýggi stoltleikin hjá BP, framleiðslu- og goymsluskipið Glen Lyon við kós móti oljuleiðunum millum Hetland og Føroyar.

# Risastórt oljuskip við kós móti føroyska markinum

**Jan Müller**

11.12.2015 - 00:41

Oljan.fo

Eitt av heimsins størstu oljuframleiðslu- og goymsluskipum, Glen Lyon, sum er bygt í Korea, hevur nú sett kós móti oljuleiðunum eystan fyri føroyska markið. Skipið avloysir eitt eldri og minni skip av sama slag, sum síðani 1998 hevur tikið ímóti nærum 400 mill. tunnum av olju frá eini tí størstu oljukelduni á bretska landgrunninum, Schiehallion. Henda liggur skamt frá føroyska markinum. Tað er BP, sum er fyristøðufelag, og sum stendur fyri hesi ovurhonds stóru útbyggingini, sum skal tryggja víðari framleiðslu næstu 25 árini.

Umframt at byggja nýtt FPSO skip til hesa oljuleiðina, verða eisini stórar íløgur gjørdar í framleiðsluútbúnað á havbotninum. Verkætlanin, sum fevnir um tvær oljukeldur, Schiehallion og Loyal, verður eisini nevnd Quad 204 og er hon at meta sum eitt týðandi vegamót í framtíðar oljuvirkseminum vestan fyri Hetland. Nýggj tøkni og menning á framleiðsluøkinum ger hesa kelduna til nakað heilt serligt og verður roknað við, at eisini

aðrar framleiðslueindir og útbyggingar fara at njóta ágóðan av øllum teimum nýhugsanum og núgerðum, sum eru partur av Quad 204 verkætlanini.

Henda er so bara eitt av mongum milliarda útbyggingum, sum fara fram vestan fyri Hetland í hesum døgum. Hóast steðgur er at hóma í flest øllum øðrum økjum í heiminum, so er økið millum Hetland og Føroyar beint tvørturímóti merkt av stórum og umfevnandi útbyggingum.

Hjá BP, sum stendur fyri flestu av framleiðslueindunum vestan fyri Hetland, eru tey sera fegin um, at Glen Lyon loksins hevur sett kós móti oljuleiðini í Atlantshavi. Skipið fer tó á royndartúr fyrst út fyri skipasmiðjuna Hyundai Heavy Industries í Suðurkorea, áðrenn kósin verður sett móti leiðunum millum Hetland og Føroyar. Skipið er 270 metrar langt og 52 metrar breitt.

So umfatandi er henda eina verkætlanin, at ein serstakur boripallur burturav, Deepsea Aberdeen, er bygdur til at bora ikki færri enn 20 brunnar á kelduni komandi sjey árini. Pallurin er farin undir at bora teir mongu framleiðslubrunnarnar.

Tá nýggja framleiðsluskipið fer undir at framleiða olju næsta ár, verður framleiðslan umleið 130.000 tunnur um dagin. Skipið kann goyma 800.000 tunnur av olju.

Umframt BP, sum eigur 36,3% av kelduni, eru Shell við 54,03% og OMV við 9,67%.

BP arbeiðir so eisini við enn eini stórari útbygging á Atlantsmótinum, nevniliga á Clair Ridge leiðini eisini skamt frá føroyska markinum.

Kelda: BP

